# MASKINMEISTARIN

Nr. 7 / Januar 2019



KSS í vøkstri



Grøn og bjørt framtíð



SEV væntar fleiri meistarar



Skrubbarar reinsa gassroykin

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Regin Olsen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKIN-MEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKIN-MEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Frimodt Rasmussen:*
Øssur Winthereig
*Ólavur Gunnarsson:*
Ingolf S. Olsen
*Sundsverkið:*
Ingolf S. Olsen
*Norrøna:*
Øssur Winthereig

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 800

# INNIHALD

Oddagrein ........ 3
KSS trimmast eftir stóran vøkstur ........ 4
SEV væntar fleiri meistarar í starv ........ 11
Grøn og bjørt framtíð ........ 14
Felagið skal vera meiri sjónligt ........ 15
Skrubbarar reinsa gassroykin á Norrønu ........ 16
Noreg ætlar at banna skrubbarum á firðum ........ 21
Føðingardagar ........ 22
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum ........ 23










# Tvey ár við intensivum samráðingum

Alt 2018 var merkt av intensivum og ofta trekum sáttmálasamráðingum, og soleiðis verður eisini í ár.

Flestu sáttmálasamráðingarnar í fjør vóru eitt ár ella meira afturút, tí tað snúði seg um sáttmálar, ið vóru gingnir út í 2017.

At tað dregur so leingi út at endurnýggja sáttmálar er als ikki nøktandi, og orsøkin er ikki, at tað hevur verið bíðað eftir okkum. Tað er eisini púra greitt, at vit undir ongum umstøðum fara at góðtaka, at hesar samráðingarnar aftur koma í drag í ár.

Hettar var fyrstu ferð, at eg stóð á odda fyri samráðingunum, og eri eg samanumtikið hampuliga væl nøgdur við úrslitini.

1. juni bleiv semja undirskrivað við Fíggjarmálaráðið, eftir at neyðugt hevði verið at boðsenda semingsmonnunum. Semjan hevði við sær stórar broytingar í sáttmálunum fyri alment sett á landi. Við nýggjari lønartalvu fingu vit hækkað stigini úr 250 krónum upp í 480 krónur. Lønarhækkingin var í miðal 5,3 prosent, og eiga endalønirnar bróðurpartin.

Hjá Stranddfarðaskipum Landsins eru aldursstigini fækkað, so tað er blivið skjótari at røkka endalønini. Sjálv lønarhækkingin er í miðal 5,2 prosent yvir tvey ár, men eisini aðrar tillagingar eru gjørdar, eitt nú í kostpeningi og umflokking, sum geva rættiliga fitt til tey, ið eru fevnd av hesum.

Sáttmálalønin fyri Magnus Heinason hækkaði 4,8 prosent. Hjá Vørn liggur lønarspurningurin hjá Tænastumannafelag Landsins, so har var sáttmálin fyri okkara viðkomandi óbroyttur.

6. juni bleiv semja undirskrivað við Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri privat sett á landi. Her er millum annað talan um eina lønarhækking upp á 5,9 prosent yvir tvey ár, og eisini hækka viðbótarstigini við umleið sjey prosentum.

Sáttmálin við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið bleiv loksins undirskrivaður í oktober, og eisini her var neyðugt at fáa Semingsstovnin upp í leikin. Sáttmálin fevnir um maskinmeistarar hjá SEV og IRF.

Úrslitið var ein diffirensierað lønarhækking upp á 5,2 prosent í miðal, umframt at tímar blivu keyptir úr sáttmálanum, sum høvdu eitt virði uppá 0,76 prosent. Miðallønarhækkingin bleiv tí samanlagt 5,94 prosent yvir tvey ár. Aðrar tillagingar blivu eisini gjørdar, sum høvdu við sær eina lønarhækking til ávísar meistarar.

Í ár eru so regluligar samráðingar á skránni, og vit eru longu byrjað við samráðingunum við Reiðaríið fyri Handilsskip, sum tað nú eitur.

Sáttmálin við Føroya Reiðarafelag vegna fiskiskipini er uppsagdur. Hann gongur út 1. apríl, og her verður uttan iva talan um harðar samráðingar, serliga grundað á allar broytingarnar í lønarviðurskiftunum, sum fiskivinnunýskipanin hevur havt við sær.

1. oktober standa so teir almennu sáttmálanir aftur fyri tørni. Eisini her verður heilt víst talan um harðar samráðingar, serliga tí vit í seinastuni hava sæð, at summi fakfeløg hava fingið væl meira í lønarposan enn vit og onnur.

Fari til seinast at nýta høvið at ynskja øllum limum felagsins og lesarunum av blaðnum annars eitt gott og eydnuberandi nýggjár.

Ólavur Gunnarsson
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*

# KSS trimmast eftir stóran vøkstur

**KSS – sum fyrr æt Klaksvíkar Sleipistøð – er vaksin so nógv í uppsvinginum seinastu árini, at rúgvan vann á dygdini. Nú verður fyritøkan trimmað, so dygdin kemur í hásæti. Frimodt Rasmussen, stjóri, heldur, at ein fyrtøka sum KSS eigur at bera samfelagnum nakað aftur**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

Hendan dagin í desember lá fraktskipið Vestborg við bryggju, og menninir høvdu yvirhálað motorin, og júst tá eg var har, var motorurin startaður aftur – og hann gekk sum smurt.

Ein bátur stendur á bedingini. Tað er ein loðsbátur, sum KSS eigur. Har var eitt tómt pláss á bedingini, so til bar at gera onkrar umvælingar.

Klaksvíkar Sleipistøð, ella KSS, sum sleipistøðin nú eitur, er blivið eitt av stóru arbeiðsplássunum í Klaksvík.

Frimodt Rasmussen keypti Klaksvíkar Sleipistøð í 2011 saman við faðir sínum og einum øðrum.

Sleipistøðin var sett á stovn í 1928 og hevur so statt 90 ár á baki.

Tá Frimodt og teir keyptu sleipistøðina, vóru teir 16 mans, sum arbeiddu har.

– Fólkið, sum átti felagið, áðrenn vit keyptu tað, teir arbeiddu her og høvdu keypt sítt egna arbeiðspláss aftur, eftir at sleipistøðin stongdi undir krepppuni í 1993. Tað er í tí ljósinum, søgan skal síggjast. Teir hava havt sítt egna arbeiðspláss, hava havt nóg mikið at gjørt og hava klárað seg, greiðir Frimodt Rasmussen frá.

Høvuðsuppgávan hjá Klaksvíkar Sleipistøð var at veita tænastur til bátarnar í Klaksvík. Bedingin var nóg stór til, at línubátarnar kundu takast upp.

## Alt byrjaði á sleipistøðini

Nú verða umleið 40 skip tikin upp um árið. Bedingin klárar at taka skip upp, sum eru upp í 65 metrar og 1500 tons. Tað er, hvat spælið kann draga. Undirlendið – skinnarar og annað – er gjørt av nýggjum og tolir meiri, um tað skuldi verið.

Frimodt Rasmussen er avlærdur á sleipistøðini, lærdi síðani til maskinmeistara, hevur siglt í handilsflotanum, arbeitt í alingini og hevur eisini verið inspektørur hjá Thor.

Í hesum arbeiðnum ferðaðist Frimodt víða kring heimin, og vóru tað góðar royndir, tá møguleikin stakk seg upp at keypa Klaksvíkar Sleipistøð.

– Eg havi tikið sumt av tí, eg havi sæð uttanlands, við mær. Áðrenn vit tóku yvir, var vanligt, at menninir, sum arbeiddu her, tóku uppgávur, sum teir kláraðu sjálvir at loysa. Vóru uppgávurnar ov stórar ella kanska høvdu okkurt við el at gera, so tóku teir ikki uppgávuna á seg, sigur Frimodt Rasmussen, sum sjálvur ikki hevur verið smæðin at taka stórar uppgávur til smiðjuna.

– Eg var meiri tann vegin, at vit kunnu gott gera tað, men so fann eg samstarvspartnarar, sum kundu loysa uppgávurnar. Soleiðis kom meiri arbeiði hendan vegin. Knappliga kundu vit gera nógv meiri, sjálvt um vit vóru fá, og høvdu vit ikki ekspertisuna, so keyptu vit hana inn.

Síðani hevur vøksturin verið øgiligur, tí í dag eru millum 60 og 70 fólk, ið arbeiða á KSS, sum Frimodt Rasmussen kallar Klaksvíkar Sleipistøð.

– Soleiðis fingu við meiri og meiri arbeiði og máttu renna skjótari og skjótari. Tað er vinkulin, sum vit hava arbeitt við alla tíðina.

## Øll arbeiði skulu gerast

Men tá vøksturin hevur verið so ógvusligur, eru nógv onnur ting, sum skulu fylgja við:

– Eitt er at hava menn, sum arbeiða, og teir eru dugnaligir, men nógv skulu eisini at fylgja upp. Tað veri seg innkeyp, bókhald, lønir og tollingar og nógv afturat, sigur Frimodt Rasmussen og leggur skemtandi afturat:

– Í fyrstani var kanska onkur sum hevði ilt við at síggja, hví man skuldi hava so nógv fólk, sum einki gjørdu.



*Bedingin hjá KSS liggur beint innan fyri Kósavirkið*



Framhald á næstu síðu >>

KSS – TRIMMAÐ EFTIR STÓRAN VØKSTUR

*Framhald á næstu síðu >>*



*Jógvan Fróðin Baldvinson*



*Frimodt Rasmussen og Dánjal Müller*





*Ísak Mikladal á goymsluni*

Áðrenn nýggju eigararnir yvirtóku sleipstøðina, hevði ein kvinna arbeitt har, og hon hevði arbeitt í yvir 50 ár, og hon hevði klárað tað fínt, men nú skuldu knappliga fleiri fólk inn.

Sum Klaksvíkar Sleipistøð vaks, so breiddi hon seg eisini úr Klaksvík og kring landið, og júst tí var ein av avgerðunum hjá nýggja stjóranum at skifta navn til KSS.

– Tá Klaksvík er í navninum, so er størri vandi fyri, at man bara verður knýttur at Klaksvík. KSS er eitt fínt navn, og tá eg eri uttanlands, so er tað eisini lætt at siga og skriva, heldur Frimodt Rasmussen.

– Eg plagi at siga, at vit eru góðir til motorarbeiði, stálarbeiði og alt, sum hevur við deksmaskinarí – spøl og kranar – at gera. Tað er styrkin hjá okkum, heldur stjórin.

Men í fjør legðist elarbeiði afturat, tí tá keypti KSS elektromekaniska felagið Johs.elektro, sum hava lagt seg eftir at umvæla generatorar og elmotorar og gir.

– Tað felagið koyrir við síðuna av KSS og gevur tað teimum eitt sindur meiri og okkum eitt sindur meiri, sigur Frimodt Rasmussen.



*Martin Kjærbo*

**”Áðrenn nýggju eigararnir yvirtóku sleipistøðina, hevði ein kvinna arbeitt har, og hon hevði arbeitt í yvir 50 ár, og hon hevði klárað tað fínt, men nú skuldu knappliga fleiri fólk inn“**

KSS ger bara smávegis við timburarbeiði – tað verður keypt inn og tað sama við vanligum elektrikarum.

## Kapping millum smiðjur

Enn eru nakrar skipasmiðjur í landinum, sum KSS skal kappast við. Í Vági er Vágs Skipasmiðja, MEST hevur smiðjur í Havn, á Skála og í Vestmanna, og so er ein lítil beding í Klaksvík innan fyri KSS.

Mesta arbeiði há KSS er innan línubátar og trolarar og so bátarnar í alivinnuni – brunnbátar og tvíkiljur.

Arbeiðsuppgávurnar hjá KSS kunu býtast í tríggjar høvuðspartar: Arbeiði á landi, alivinnan og fiskivinnan, sum fylla áleið ein triðjing hvørt.

Eitt av arbeiðinum á landi er saman við Articon á Sundi. Tað arbeiðið eru øll rørini, sum skulu knýta gamla og nýggja Sundsverkið saman. Ein lang gongd er gjørd millum bæði verkini, og har eru millum annað oljurør, damprør og tungoljurør. Samanbindingin er eitt stórt arbeiði, tí tað er ikki bara at knýta bygningarnar saman, men allar skipanirnar skulu knýtast saman.

**”Arbeiðsuppgávurnar hjá KSS kunu býtast í tríggjar høvuðspartar: Arbeiði á landi, alivinnan og fiskivinnan, sum fylla áleið ein triðjing hvørt“**

Í alivinnu er tað fyrst og fremst viðlíkahald av bátum og flakum. Antin koyra bilarnir hjá KSS kring landið, ella koma bátarnir til Klaksvíkar.

KSS hevur 35 bilar, sum koyra kring landið og loysa uppgávur.

– Bilurin er ein verktoyskassi, og tað ber ikki til at fara út, uttan at øll tey neyðugu amboðini eru við í verktoyskassanum.

Triðja er fiskivinnan. Tá kann vera talan um klassing, og tað er planlagt arbeiði, har KSS onkuntíð hevur givið prís upp á arbeiði í kapping við onnur. Harafturat eru tað arbeiði, har bátarnir koma inn við brotnum lutum til umvælingar, og tað skal ganga skjótt fyri seg.

- Vit liva eisini nógv av skjótum umvælingum, har ein bátur kemur inn at landa og skal hava okkurt ornað, áðrenn hann fer avstað aftur sama kvøld.

## Næstan alt á goymslu

Slíkar skjótar umvælingar krevja, at teir liggja inni við nógvum eykalutum. KSS hevur eina goymslu upp á umleið 10 milliónir krónur.

Frimodt heldur, at tað man ikki vera nógva staðni í heiminum, at man fær deilir so skjótt sum í Føroyum.

**”– Júst tí vit liggja so langt burtur frá nógvum ger, at man eigur allan lort inni. Aðrastaðni hava teir centralgoymslur, har tingini koma til dømis dagin eftir á middegi“**

– Júst tí vit liggja so langt burtur frá nógvum ger, at man eigur allan lort inni. Aðrastaðni hava teir sentralgoymslur, har tingini koma til dømis dagin eftir á middegi. Tað hava vit ikki her. Vit hava ein ørðvísi bygnað av feløgunum, heldur Frimodt Rasmussen.

Hann vísir eisini á, at hóast kapping er millum ymsar smiðjur, so er gott samstarv.

– Vit kappast hvønn dag, men vit arbeiða eisini væl saman. Vit liggja ikki allir inni við øllum. Tað er ikki beinleiðis avtalað, men vit vita, hvat hvør hevur, sigur Frimodt. Tó so, vit skulu altíð liggja





*Óli Karl Olsen*

*Grímur Rasmussen, sonur stjóran, hevur valt somu leið, sum faðirin*

inni við nóg mikið av til dømis stáli, rørum og bendum. Er brúk fyri serligum motorlutum, tá er týdningarmikið at hava gott samband við aðrar smiðjur.

KSS hevur umboð fyri Caterpillar og MAK, men teir arbeiða eisini nógv upp á aðrar motorar.

Seinastu árini hevur KSS eisini havt arbeiði uttanlands. Onkuntíð kanska tí maskinmeistarin er føroyingur, ella bara tí reiðarríðið hevur hoyrt um KSS – kanska á onkrari messu. Teir hava verið í millum annað Svalbard, Norra, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Skotlandi og arbeitt.

Er tað í Norra, so er líka skjótt at senda ein mann úr Føroyum, sum ein í Suðurnorra upp til Norðurnorra.

– Ein orsøk kann eisini vera, at príslegan í Norra er so mikið høg, at tað loysir seg at taka okkum yvir, sigur Frimodt Rasmussen.

Tá teir arbeiða uttanlands, so fara tveir-tríggir mans avstað við flogfari og hava neyðugu amboðini við sær.

Tað kemur eisini fyri, at fólk frá útlendskum smiðjum koma til Føroya at yvirhála ein motor ella gera onkrar umvælingar.

– Tað er tí, at kappingin er so hørð, kanska mest um tær planløgdu uppgávurnar, har reiðaríini kunnu biðja um prís í góðari tíð, tí mugu vit vera óluksáliga spískir, tá við geva tilboð, tí vit eru ikki einsamallir, sigur Frimodt Rasmussen.

## Dygd og rúgva

KSS hevur eisini merkt, at tey seinastu árini hevur verið eitt øgiligt uppsving, men í 2018 er umsetningurin minkaður nakað, men fortjenastan er tann sama. Frimodt Rasmussen sigur, at teir

royna at skilja millum kvantitet og kvalitet.

– Tú kanst gott renna so skjótt, at tú arbeiðir so nógv, at tað er bara skúm. Tú brúkar eina rúgvu av pengum, men so skal okkurt

> **”KSS hevur eisini merkt, at tey seinastu árini hevur verið eitt øgiligt uppsving, men í 2018 er umsetningurin minkaður nakað, men fortjenastan er tann sama“**

gerast umaftur, tí tað er ikki í ordan, sigur Frimodt Ramussen.

– Í staðin fyri siga vit, at nú ætla vit ikki arbeiða so skjótt og hart, men eg ætli mær at arbeiða



KSS – TRIMMAÐ EFTIR STÓRAN VØKSTUR

*Framhald á næstu síðu >>*



*Benjamin Norðoy og Thorstein Joensen í maskinrúminum á Vestborg*

ordiliga. Tað er so ræðuliga skjótt bara at leypa við, tá alt gongur við fullari ferð. Tað er einki lætt i dag at siga, nú steðga vit eitt sindur á, sigur ársins leiðari.

Kortini roynir hann ikki at siga beinleiðis nei til uppgávur, men heldur gera tilboðini soleiðis, at tað er fínt um teir fáa arbeiði, tí annars høvdu teir arbeitt fyri einki.

– Hetta er ein gongd hjá okkum, tí vit síðani 2011 er vaksin so nógv. Vit mugu siga: hov, hov, nú mugu vit ansa eftir okkum, sigur Frimodt Rasmussen.

Í 2017 arbeiddu eini 70-80 fólk hjá KSS, men í 2018 hava tey verið 60-70.

Meðan umsetningur hjá KSS er minkaður nakað seinastu tvey

árini, ivast Frimodt í, um sama er galdandi í miðstaðarøkinum.

## Uppsvingið steðgað

– Uppsvingið í fiskivinnuni byrjaði í 2010, tá pelagisku bátarnir høvdu góð ár. Men eg haldi, at í miðstaðarøkinum byrjaði uppsvingið ikki fyrr enn í 2012-2013 og fer enn sendandi uppeftir, meðan eg veit um onnur – til dømis her norðanfyri – har umsetningurin er minkaður, sigur Frimodt.

Hann heldur, at lægru skattainntøkurnar í eitt nú Klaksvík og Eysturkommunu vísa, at nú er uppsvingið steðgað nakað.

> **”Um bara ein lítil niðurgongd er í fiskivinnuni, so merkja vit tað – tað er kontant avrokning við kassa eitt, sigur Frimodt Ramussen, sum heldur seg síggja tekin um, at summir bátar kanska bíða við onkrum umvælingum“**

– Eg vænti, at í miðastaðarøkinum stendur tað við í eini tvey-trý ár afturat, men vit her norðuri merkja tað beinanvegin. Um bara ein lítil niðurgongd er í fiskivinnuni, so merkja vit tað – tað er kontant avrokning við kassa eitt, sigur Frimodt Ramussen, sum heldur seg síggja tekin um, at summir bátar kanska bíða við onkrum umvælingum.



*Elian E. Elttør og Benjamin Mikladal á skrivstovuni*





*Frimodt Rasmussen við bedingina, har loðsbáturin Tjørnunes stendur uppi*

Sjálvt um stjórin á KSS í løtuni trimmar fyritøkuna, so hugsar hann eisini um, hvørjir vakstrarmøguleikar eru.

Hann nevnir arbeiði uttanlands, men eisini møguleikan at byggja skip ella gera skip liðug, tá skrokkurin er bygdur onkra aðrastaðni.

– Vit hava teir førleikarnar, sum skulu til fyri at montera eitt skip liðugt, sigur Frimodt Rasmussen.

Í løtuni eru 24 lærlingar á KSS: 20 smiðjulærlingar, ein goymslulærlingur, ein skrivstovulærlingur og tveir elektromekanikklærlingar. Restin er arbeiðsfólk, smiðir, maskinmeistarar, tekniskir teknarar, goymslufólk, skrivstovufólk.

– Eg havi brúk fyri fólki, og har hugsi eg: hvør skal tíma at framleiða fólk til mín. Skal eg vænta, at nakar annar ger tað. Eg má sjálvur seta við. Í Føroyum er tað so, at teir flestu, sum hava verið í smiðjulæru, fara víðari til maskinmeistara, so eg hugsi, at hevði eg bara havt ein ella tveir eftir, sigur Frimodt Rasmussen.

Hann heldur, at júst ein smiðja kann taka nógvar lærlingar, tí teir flestu fara víðari. Í øðrum fyritøkum kann vera verri at taka lærlingar, tí teir útlærdu vera verandi.

### Ársins leiðari

Stjórin á KSS, sum var valdur til ársins leiðara í 2018, gerst eitt sindur lítillátin, tá eg spyrji hann beinleiðis, hví hann varð valdur til ársins leiðara:

– Eg veit ikki rættuliga. Eg var innstillaður fyrraárið. Eg fór suður, men haldi ikki, eg kendi eitt menniskja har inni. So var eg aftur í ár og bleiv so valdur. Eg gangi út frá, at grundin til, at eg bleiv valdur, er, at vit hava havt ta framdrift, sum vit hava havt.

– Eg veit ikki rættuliga, um míni leiðaraevni hava gjørt so stóran mun. Eg veit ikki, um tey, sum eru her, eru so samd í, at eg eri ársins leiðari.

Í takkarrøðuni á ársins leiðaradegi segði Frimodt Rasmussen eisini, at hann helt, at fyritøkan hevði eina ávísa skyldu at bera samfelagnum nakað aftur

– Eg haldi, vit hava nakrar skyldur í samfelagnum. Eg liggi her í Klaksvík – eg njóti gott av kringumstøðunum her í Klaksvík. Eg haldi ikki, tað ger nakað, at okkurt verður borið aftur. Eg njóti eisini gott av at vera her, og arbeiðsfólkið er nær við. Eg síggi eitt virði í tí.

– Eg haldi, at vit sum hava fingið loyvi at virka her í Føroyum, at skulu vit gera tað betri fyri okkum og okkara eftirkomarar, so mugu vit bera okkurt aftur.





*Útbyggingin av Sundsverkinum við Støð 3 verður liðug at taka í nýtslu seint í ár. Maskinmeistaramanningin er longu uppnormerað við tveimum ársverkum*

# SEV væntar fleiri meistarar í starv

**Ongin vandi er fyri, at maskinmeistarar fara at nýtast at ganga arbeiðsleysir í komandi tíðum. Longu í dag eru maskinmeistarar eftirspurdir allastaðni, og umleggingin til grøna orku fer at økja eftirspurningin mundandi**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

Maskinmeistarafakið er sera væl fyri samanborið við so nógv onnur fakøki, tá tað snýr seg um eftirspurning eftir fólki. Tað er galdandi í øllum teimum framkomnu londunum og ikki minni í Føroyum.

Og alt bendir á, at gravgangurin eftir maskinmeistarum her heima fer at økjast munandi í sambandi við umleggingina av øllum samfelagnum til grøna orku.

44 limir í Maskinmeistarafelagnum eru í dag í starvi hjá SEV, og Heri Mortensen, deildarstjóri fyri elframleiðsluna hjá interkommunala orkufelagnum, væntar, at brúk fer at verða fyri fleiri, so hvørt sum umleggingin til grøna orku tekur dik á seg.

– Tað er eitt evni, sum vit tosa um innanhýsis; sjálvandi kunnu vit ikki siga akkurát nú, hvat tørvurin verður, men vit kunnu vænta, at tað verður brúk fyri fleiri enn í dag, sigur hann.

### Tvífaldað framleiðsla

Framleiðslustjórin á SEV vísir á, at 2030-visjónin há SEV merkir, at tað skal framleiðast minst tvær ferðir so nógv elorka í 2030 samanborið við nú.

Í dag er samlaða elnýtslan á landi í Føroyum umleið 350 GWt (gigawatttímar) um árið. Tá grøna umleggingin er framd, verður nýtslan væntandi okkurt um 600 GWt um árið. Men harumframt skal framleiðast til goymslu, serliga í pump to storage-skipanum, har vatn verður pumpað niðan í byrgingar at brúka í vatnorkuverkum.

– Tí er tað ongin ivi um, at umleggingin til grøna orku fer at økja eftirspurningin eftir maskinmeistarum og eftir øllum slagi av fólki, sum arbeiða innanfyri el. Alt verður jú elektrifiserað, sigur Heri Mortensen

*Framhald á næstu síðu >>*

**”Tí er tað ongin ivi um, at umleggingin til grøna orku fer at økja eftirspurningin eftir maskinmeistarum og eftir øllum slagi av fólki, sum arbeiða innanfyri el. Alt verður jú elektrifiserað“**

## Yvirskipaðar uppgávur

Heri Mortensen væntar tó ikki, at tað verða maskinmeistararnir, sum í framtíðini fara at vera teir, sum skrúva sundur og skrúva saman og gera alt tað siðbundna, handliga arbeiðið.

– Tað, sum eg síggi fyri mær, er, at myndin fer at broytast til, at maskinmeistarin verður tann høgt útbúni, sum hevur tær meira yvirskipaðu uppgávurnar – situr við viðlíkahaldsprogramminum, skermstýringini, vaktararbeiðnum og so framvegis – meðan veitarar, til dømis vindmylluveitarar, og hondverkarar frá veitarunum, verða teir, sum skulu skrúva og gera tað manuella arbeiðið, sigur hann.

## Spesialisering

Heri Mortensen ber ongan ótta fyri førleikunum hjá føroysku maskinmeistarunum at vera tøkniliga álitið í skiftinum frá elframleiðslu úr termiskari orku til framleiðslu úr varandi orkukeldum.

– Føroysku maskinmeistararnir hava hollar førleikar til elframleiðslu, og teir hava megnað uppgávuna ógvuliga væl nú í gott 100 ár, so teir fara eisini at megna hetta. Útgangsstøðið er gott, tí vit hava eina framúr góða maskinmeistaraútbúgving á Vinnuháskúlanum. Um tað heldur fram, at føroysku maskinmeistararnir eru so væl kvalifiseraðir bæði til roterandi maskinur og el, so er talan  jú um eina øgiliga kompetenta arbeiðsmegi innan elveiting.

– Tó vænti eg, at vit frameftir fara at síggja meira spesialisering hjá tí einstaka maskinmeistaranum hjá SEV, til dømis innanfyri automasjón, teldustýringar, smart grid og annað. Men vit hava frammanundan í fleiri ár havt spesialistar, eitt nú innan skermstýring, tað er ein spesialisering, teir kunnu nema sær hjá SEV, og tað fer eisini at bera til innan onnur serøki, sigur hann.

## Uppnormering byrjað

SEV hevur júst sett fimm nýggjar maskinmeistarar á Sundi. Tvey av størvunum eru beinleiðis uppnormering, meðan hini trý vóru tøk, tí nakrir maskinmeistarar eru farnir í niðursetta tíð samsvarandi 60+ og pensjónspolitikkinum hjá SEV.

Uppnormeringin er í fyrsta lagi gjørd í sambandi við útbyggingina av Sundsverkinum við sonevndu støð 3, sum verður liðug at taka í nýtslu seint í ár, men hugsað verður tó longur fram enn so.

– Vit kenna ikki rættiliga eginleikarnar við nýggja verkinum,

**”Alt hetta fólki er so væl útbúgvið, og vit vænta eisini at seta fleiri, tí tá skulu vit hava eina rúgvu av framleiðslueindum, bæði við vindi, vatni, sól og møguliga øðrum enn rættiliga óroyndum orkukeldum. Umframt øktu framleiðsluna skal alt netið eisini útbyggjast og dagførast“**



*– Eg plagi at siga við ung fólk, sum ætla at útbúgva seg, at elbransjan er stak áhugaverd og verður enn meira áhugaverd, tí vit eru á veg heilt burtur frá fossilum brennievni. Alt verður elektrifiserað, so alt innanfyri elbransjuna fer at krevja støðugt meira fólk, sigur Heri Mortensen, framleiðslustjóri hjá SEV, her avmyndaður við vindmyllulundina hjá SEV í Húsahaga omanfyri Havnina. Sjálvur er hann sterkstreymsverkfrøðingur við sergrein innan automasjón*





um tað skal fleiri fólk til, ella at automatikkurin riggar so væl, sum leverandørarnir lova, at næstan onki fólk krevst. Men upp á sikt er tað jú ætlanin hjá SEV, at tann termiska orkan skal lagast niður, og tá, eftir 2030, verður í øllum førum ikki neyðugt at hava so stóra manning á Sundi, men ongin verður arbeiðsleysur av tí orsøk.

– Alt hetta fólki er so væl útbúgvið, og vit vænta eisini at seta fleiri, tí tá skulu vit hava eina rúgvu av framleiðslueindum, bæði við vindi, vatni, sól og møguliga øðrum enn rættiliga óroyndum orkukeldum. Umframt øktu framleiðsluna skal alt netið eisini útbyggjast og dagførast, sigur Heri Mortensen.

**”Vit síggja longu nú, at nógvar vinnueindir eru so stórar, serliga innan fiskivinnu og alivinnu, at tær hava síni egnu lítlu elverk sum back up. Tí seta tær eisini fleiri maskinmeistarar. Tað sama er galdandi í eitt nú fleiri stórum kommunum“**

## Sama hvør framleiðir

Nú er tað ikki vist, at SEV einsamalt skal standa fyri allari umleggingini frá svartari til grøna orku. Til dømis skulu allar útbyggingarnar av vindorkuframleiðsluni bjóðast út, og tí er hugsandi, at aðrir framleiðarar koma upp í leikin. Sum nú er, er felagið Røkt, sum hevur vindmyllulund á Mýrunum oman fyri Vestmanna, einasti elframleiðarin afturat SEV í Føroyum.

Men tað fer ikki at broyta upp á tørvin á maskinmeistarum, hvør tað so er, sum framleiðir streymin, heldur Heri Mortensen, og vísir samstundis á, at elektrifiseringin eisini krevur góða ekspertisu á brúkarasíðuni.

– Vit síggja longu nú, at nógvar vinnueindir eru so stórar, serliga innan fiskivinnu og alivinnu, at tær hava síni egnu lítlu elverk sum back up. Tí seta tær eisini fleiri maskinmeistarar. Tað sama er galdandi í eitt nú fleiri stórum kommunum, sum umframt at hava fleiri vatnverk og umfatandi vatnveiting eisini gerast støðugt størri elbrúkarar, sigur hann.

FAKTA

## Visjón 2030

*SEV hevur sett sær sum mál, at øll elframleiðsla á landi í Føroyum skal vera grøn í 2030. Eisini sitandi landsstýrissamgonga hevur sett sær hetta mál og víðkað tað til at umfata alla orkunýtslu á landi – tað er, at øll orkunýtsla til dømis til upphiting og ferðslu, verður grøn.*

*Tað merkir í roynd og veru eina 100 prosent elektrifisering av allari orkunýtslu á landi í 2030. Tí verður, sambært SEV, neyðugt í minsta lagi at tvífalda elframleiðsluna til ta tíð fyri í fyrsta lagi at kunna nøkta eftirspurningin, sum væntast at verða tvífaldaður í mun til í dag, og í øðrum lagi at framleiða streym til goymslu – serliga við at pumpa vatn niðan í byrgingar – at brúka, tá náttúrlig viðurskifti tálma framleiðsluni úr varandi orkukeldum.*

*SEV framleiddi 352 GWt í 2018, og tað er met. 48,8 prosent var grøn framleiðsla úr vatni og vindi, og 51,2 prosent var framleitt á oljuriknu verkunum. Framleiðsla og nýtsla eru nøkulunda tað sama í dag, men við goymsluskipanunum, sum verða neyðugar, tá farið verður burtur frá oljuni, má framleiðslan verða munandi størri enn nýtslan. Tískil væntar SEV, at samlaða elframleiðslan í Føroyum verður umleið 700 GWt um árið í 2030, tá sjálv nýtslan væntast at verða umleið 600 GWt.*

# Grøn og bjørt framtíð

**Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum vil lokka fleiri at útbúgva seg sum maskinmeistara, tí hann væntar stóran gravgang eftir meistarum, so hvørt sum tað verður lagt um frá svartari orku til grøna orku. Økti eftirspurningurin eigur eisini at síggjast aftur í lønarlagnum, heldur hann**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, er ikki í iva um, at broytti hugburðurin til menniskjalig árin á náttúru og umhvørvi generelt fer at styrkja maskinmeistarafakið og økja eftirspurningin eftir maskinmeistarum í Føroyum.

Ítøkiliga fer umleggingin frá svartari, termiskari orku til varandi orkukeldur at merkja gravgang eftir maskinmeistarum. Hetta verður eisini váttað av SEV í aðrari grein her á síðunum.

## Spennandi og avbjóðandi

– Vit eru í eini ógvuliga spennandi tíð fyri fakið og arbeiðsmøguleikarnar hjá maskinmeistarum. Visjónin um 100 prosent grøna orkunýtslu á landi í 2030 fer heilt vist at økja eftirspurningin eftir maskinmeistarum munandi.

– Tað er sjálvsagt gott í sær sjálvum, at útboðið av arbeiðsplássum fer at vaksa, men ikki minni er tað positivt, at her tosa vit eisini um fakliga sera spennandi og avbjóðandi arbeiði. Fyrst er talan mest um vind og vatn, men hyggja vit longur fram, kunnu vit vænta, at føroyska orkunýtslan fer at vera alt slag av varandi orkukeldum, til dømis sólorka og sjóvarfalsorka, og ikki dálkandi brennievni sum biogass, sigur Ólavur Gunnarsson.



*– Øktur eftirspurningur merkir eisini økt kapping um maskinmeistararnar, og tað fer at trýsta lønirnar rætta vegin, sigur Ólavur Gunnarsson*

## Økt krøv til felagið

At gravgangurin eftir maskinmeistarum veksur, merkir eisini økt krøv til fakfelagið.

– Eg síggi tað sum eina skyldu at herða marknaðarføringina av fakinum og lokka fleiri at taka maskinmeistaraútbúgvingina, nú eftirspurningurin væntandi fer at vaksa. Hetta vil felagið fegin gera saman við Vinnuháskúlanum, sigur formaðurin.

Tað er eisini týdningarmikið, at Maskinmeistarafelagið sum fakfelag fylgir við tíðini og framhaldandi megnar at draga nýggjar maskinmeistarar at sær.



– Um talan verður um heilt nýggj arbeiðspláss, har vit ikki frammanundan hava sáttmála, so er tað er jú ikki nakur sjálvfylgja, at teir verða limir hjá okkum. Men tað mugu vit syrgja fyri, at tað verður, og tí mugu vit eisini alla tíðina dagføra okkum sum felag og ta tænustu og tey tilboð, vit bjóða okkara limum, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

## Lønin fer rætta vegin

Øktur eftirspurningur eftir maskinmeistarum eigur eisini at síggjast aftur í lønarlagnum, leggur Ólavur Gunnarsson dent á.

– Øktur eftirspurningur merkir eisini økt kapping um maskinmeistararnar, og tað fer at trýsta lønirnar rætta vegin. Vit skulu bara syrgja fyri, at gongdin verður avspeglað í sjálvum sáttmálunum og ikki bara í individuellum avtalum. Eitt skump tann vegin er eisini tiltrongt, tí maskinmeistaralønirnar á landi hava leingi verið ov lágar, sigur Ólavur Gunnarsson.




# Felagið skal vera meira sjónligt

**TEKSTUR OG MYND:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tá Ólavur Gunnarsson í fjør stillaði upp sum formaður í Maskinmeistarafelagnum, var eitt av hansara málum, at felagið skuldi verða meira sjónligt – bæði fyri limunum og í samfelagnum annars.

Okkurt er eisini hent síðani, millum annað skrivar formaðurin við jøvnum millumbilum tíðargreinar út á heimasíðuna og sosialu miðlarnar, men hann ótolnast tó eftir at sleppa meira ítøkiliga til verka í so máta.

– Vit skulu meira út, og vit skulu seta fleiri tiltøk á breddan. Ikki minst er hetta neyðugt sæð í ljósinum av, at vit kunnu rokna við øktum gravgangi eftir maskinmeistarum fram eftir. Men vit hava sitið í sáttmálasamráðingum líka síðani, eg tók við sum formaður í mars í fjør, og árið í ár fer eisini at verða merkt av samráðingum. Tá tær eru av, skal tíðin brúkast til at røkja limirnar og marknaðarføra felagið, sigur Ólavur Gunnarsson.




*Framhald á næstu síðu >>*

*Norrøna á veg úr Havn til Reykjavíkar fyri kortum. Skrubbarar, sum vórðu settir í skipið fyri einum ári síðani, hava riggað væl, og teir reinsa gassroykin frá oljuni fyri svávulútlát*

# Skrubbarar reinsa gassroykin á Norrønu

**Smyril line var tíðliga á veg í royndini at reinsa royk og damp frá motorunum á Norrønu. Longu í 2011 fór felagið undir fyrstu royndirnar at nýta sonevndar skrubbarar at minka um útlátið. Fyrstu árini riggaðu skrubbararnir illa, men seinasta árið hava teir riggað væl**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Í fleiri ár hevur kjakið um veðurlagsbroytingar og umhvørvi bent kjakið inn á útlátið frá brennievni frá øllum heimsins skipum. Serliga er tað tungoljan, sum hevur dálkað illa, og útlátið av svávuli hevur verið alt ov nógv. Í hesum sambandi fóru serfrøðingar undir at finna loysnir, sum kundu minka um útlátið, og ein slík uppfinning eru sonevndir skrubbarar.

Ein teirra, ið gekk á odda á Smyril Line at fara undir at reinsa royk og damp á Norrønu fyri svávul, er núverandi formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Ólavur Gunnarsson. Hann var í fleiri ár í starvi hjá Smyril Line, og her gekk hann fremstur í stríðnum at minka um úlátið frá motorunum, soleiðis at Norrøna kundi lúka øll altjóða krøv – eisini komandi krøv.

> **„Skrubbarar eru stór hylki, sum reinsa roykgass – fyrst og fremst fyri svávul – og tað er serliga í tungolju, at svávulinnihaldið er høgt“**

Skrubbarar av tí slagnum, sum eru settir í Norrønu, eru í veruleikanum stór hylki ella kassar, sum reinsa roykgass – í hesum førinum reinsar skipanin fyrst og fremst svávul úr roykgassinum. Motorarnir á Norrønu nýta tungolju sum brennievni, og tað er serliga í tungolju, at svávulinnihaldið er so høgt. Nógv tons av sjógvi verða pumpað inn í reinsiskipanina, og tað er sjógvurin, sum reinsar roykdampin fyri svávul.

Serliga størri skip nýta tungolju, tí hon er bíligari í rakstri. Í staðin fyri at fara yvir til diesel, velja reiðaríini heldur at reinsa roykin frá tungoljuni. Men tað er ikki bara sum at siga tað at fáa ein slíka reinsiskipan at rigga til fulnar, og tað hevur tíðin frá 2011, tá fyrstu skrubbararnir komu umborð á Norrønu, eisini víst.

## SECA-økið

Í sonevnda SECA-økinum er markvirðið á svávulinnihaldi í tungolju í mesta lagi eitt prosent, men í dag kanst tú keypa tungolju við einum svávulinnihaldi upp á 3,5 prosent, altso alt ov nógv, um siglast skal í SECA-øki.

SECA, sum stendur fyri „Sulphur Emission Control Area“, umfatar ikki Føroyar og økið kring Føroyar, men tað umfatar partar av Norðsjónum norður móti Hetlandi og ymsar aðrar partar av heiminum. At økið umfatar part av Norðsjónum ger, at Norrøna verður umfatað av ásetingunum á farleiðini til Danmarkar. Tá siglir Norrøna nevniliga í SECA øki, og má tí skil lúka SECA-krøvini.

Í økjum, sum ikki eru umfatað av SECA, er markið í løtuni 3,5 prosent. Men IMO, International Maritime Organization, hevur samtykt, at frá 1. januar má svávulinnihaldið í hesum økjum ikki vera meira enn 0,5 prosent. Í SECA-økjum verður markið framvegis 0,1 prosent.

## Koreiskir skrubbarar

Nýggju krøvini til innihaldið av svávuli í tungolju vóru ikki ásett í



*Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Ólavur Gunnarsson, gekk á odda við at fáa Norrønu skrubbarar, tá hann arbeiddi hjá Smyril Line*



*Partur av skrubbarunum heilt uppi á 6-7 hædd á Norrønu*

2011, men á Smyril Line vistu tey, at krøvini vóru á veg. Tá var prátið um skrubbarar so smátt byrjað, og nakrir útbjóðarar vóru á marknaðinum, men teir vóru fáir. Tað var hetta árið, í 2011, at fyrstu skrubbararnir komu umborð á Norrønu, og tað var suðurkoreiska fyritøkan, STI, ið bjóðaði Smyril Line skrubbarar.

Starvsfólk á Smyril Line gjørdu av at fara til Suðurkorea at tosa nærri við umboð fyri STI í Seul. Tá tey komu aftur úr Seoul, var sáttmáli undirskrivaður, og skrubbararnir vóru keyptir.

– Eg haldi, at vit í veruleikanum vóru royndarklútar hjá hesi suðurkoreisku fyritøkuni, tí sannleikin er tann, at tann skipanin riggaði ongantíð. Vit hava gjørt eitt ótal av royndum við teimum skrubbarunum, men kortini komu teir ongantíð at rigga, sum teir skuldu, sigur Ólavur Gunnarsson.

STI var ikki serliga pengasterkt, tí hava maskinfólk hjá Smyril Line sjálvi roynt at ment skipanina hesi árini.

**”Allastaðni eru tey ikki so fegin um skrubbararnar. Ferðavinnan í Noregi roynir í hesum døgum at fáa tað almenna at banna reikferðaskipum, sum brúka skrubbarar, at koma inn í norsku firðirnar. Orsøkin er, at skrubbararnir dálka firðirnar“**

– Høvdu vit havt vitanina tá, sum vit hava í dag, so vóru vit steðgaðir beinanvegin, men vitanin um skrubbarar var so ómetaliga lítil tá. Sannleikin var tann, at hylkini ella behaldararnir, har øll prosessin fer fram, vóru alt ov lítil. Tað ber ikki til at gera eina so stóra útskiljing á einum so lítlum øki, sigur Ólavur Gunnarsson.

– Tað riggar soleiðis, at roykgassið fer frá motorinum upp gjøgnum hesi stóru hylkini. Í hylkjunum ella kassunum eru fleiri røð av dýsum, sum spræna sjógv niður á roykgassið, sum so verður til sirm – tað forstøvar. Tá festir svávulið seg í droparnar, sum gerast somikið tungir, at teir fella niður aftur í ein tanga, og tá hongur svávulið altso í dropunum.

Tað hava verið ymsir trupulleikar hesi árini, til dømis er tað komið fyri, at svávulið hevur regnað beint niður aftur yvir skipið. Ólavur Gunnarsson heldur, at ringvirkningarnir av fyrstu skipanini hava verið stórir. Trupulleikarnir





*Framhald á næstu síðu >>*

hava verið órógvandi og tyngjandi fyri maskindeildina. Tað hevur til dømis verið nógvur teringur í millum annað útstoytsrørum.

## Danskir skrubbarar

Skrubbararnir úr Suðurkorea riggaðu so mikið illa øll árini frá 2011, at Smyril Line til jóla í 2017 keypti nýggjar skrubbarar, hesaferð úr Danmark. Hetta er ein nógv betri skipan, bæði hvat tilfari viðvíkur, og hylkini, har prosessin fer fram, eru eisini nógvar ferðir størri.

– Prinsippið er tað sama, men her fer nógvar ferðir meira vatn ígjøgnum, eini hundrað tons um tíman. Hesir skrubbararnir hava riggað væl alla tíðina, og ongin trupulleiki er at halda svávulinnihaldinum niðri á markinum upp á 0,1 prosent, sigur Ólavur Gunnarsson.

**”Um tú hyggur at hesum við umhvørvisligum eygum, so kann tað tykjast eitt sindur løgið, tí tú flytur útlátið, sum var á veg upp í luftina, niður í sjógvin“**

Ólavur Gunnarsson

Allastaðni eru tey kortini ikki so fegin um skrubbararnar. Ferðavinnan í Noregi roynir í hesum døgum at fáa tað almenna í Noregi at banna reikferðaskipum, sum brúka skrubbarar, at koma inn í norsku firðirnar. Orsøkin er, at skrubbararnir dálka firðirnar.

Ólavur Gunnarsson skilir á ein hátt, hvat tað er, ið norska ferðavinnan hugsar um. Men hetta er ikki so heilt einfalt.

– Um tú hyggur at hesum við umhvørvisligum eygum, so kann tað tykjast eitt sindur løgið, tí tú flytur útlátið, sum var á veg upp í luftina, niður í sjógvin. Um tað er moralskt rætt, veit eg ikki, tí útlátið hvørvur ikki heilt, tað endar jú í sjónum. Men sagt verður eisini, at í sjónum upployst tað so skjótt, at tú kanst ikki máta tað bara nakrar fáar metrar frá



*Eyðun Djurhuus, maskinstjóri á Norrønu, er væl nøgdur við skipanina. Alt verður skrásett, heilt frá tí tú byrjar ferðina í til dømis Føroyum, til tú kemur til Danmarkar. Verður eftirlit so gjørt í Danmark, og biðið verður um at síggja, hvussu skrubbararnir hava riggað eina ávísa tíð, so kann alt skrivast út og dokumenterast.*



*Maskinstjórin peikar á telduskermin í kontrollrúminum, sum vísir, hvussu skipanin við skrubbarunum koyrir í løtuni. Alt verður skrásett og goymt*



*Sjógvfiltur til pumpurnar, sum pumpa sjógv upp í skrubbararnar*

skipinum, sigur Ólavur Gunnarsson.

Hann vísir eisini á, at tað at sigla altíð er ein spurningur um fígging og búskap, og skrubbarar eru í hvussu er ein rímiliga góð og bílig loysn at koma trupulleikanum til lívs.

## Gjørdir til tungolju

Ólavur Gunnarsson vísir á, at motorarnir á Norrønu eru framleiddir til tungolju, og tað er við tungolju, at teir hava riggað nógv best. Hann sigur, at tað altíð er ein váði at skifta yvir frá tungolju til t.d. diesel.

– At skifta frá einari olju, sum er 140 hitastig, til eina olju, sum kanska ikki er meira enn 40 hitastig innanfyri stutta tíð, tað gevur stórar hitaspenningar, og vandin fyri havarií økist munandi. Tað kunnu eisini standast lekar av ymsum slag, so tað er ikki bara sum at siga tað at skifta frá einari olju til eina aðra, sigur hann.

Ólavur Gunnarsson heldur, at í dag ber bara til at halda seg til galdandi reglur og lógir, og her eru skrubbararnir ein góð loysn. Summi reiðarí er farin yvir til jarðgass, LNG (Liquified Natural Gas), sum er gass, og tað er uppaftur reinari brennievni, men tað hevur ivaleyst sínar avbjóðingar, sum hann onki einki kennir til. Millum reiðarí, sum nýta LNG sum brennievni, er Fjordline, sum siglir millum Hirtshals og Kristiansand í Noregi.

Ein onnur orkukelda, sum tað eisini verður tosað nógv um í hesum døgum, er ravlað (battarírakstur). Í Noregi eru onkrar ferjur farnar yvir til blandingsrakstur, tað er at sigla bæði við ravlaði og við diesel. Í Danmark er eisini onkur minni ferja, ið er farin yvir til ravlað burturav.

Ólavur Gunnarsson sigur, at meðan hann framvegis starvaðist hjá Smyril Line, kannaðu teir møguleikan fyri at nýta ravlað. Teir umhugsaðu at nýta ravlað og ein ljósmotor til síðuskrúvurnar á farmaskpinum Mykines, men teir komu so ikki heilt á mál við tí.

– At onkur aktivistur í dag kann finna uppá at finnast at hesum við skrubbarum, hevði kanska ikki undrað meg so nógv, um teir hugsa um mongu tonsini av sjógvi, sum verða pumpað langt upp í skipið, og sum kundu gjørt skaða á skip og maskinur, um tað brádliga fór at leka av álvara av onkrari orsøk. Hinvegin, at nokta skrubbarum, soleiðis sum støðan er, ja, tí kjakinum vildi eg fegin sloppið at verið við í, tí tey argumentini hevði eg viljað hoyrt, sigur hann.

> **”Kemur eftirlit umborð á Norrønu í til dømis Danmark, og biðið verður um at síggja, hvussu skrubbararnir hava riggað eina ávísa tíð, so kann alt skrivast út og dokumenterast“**
>
> Eyðun Djurhuus, maskinstjóri á Norrønu





# Noreg ætlar at banna skrubbarum á firðum

**Norsku sjóvinnumyndugleikarnir ætla at herða umhvørviskrøvini til skip inni á fleiri norskum firðum, sum eru væl dámd ferðamál hjá ferðafólki við reikferðaskipum.**

**TEKSTUR OG MYND:** GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Nýggjar umhvørvisherðingar eru ikki meira enn samtyktar í norsku shippingvinnuni, áður enn spildurnýggjar herðingar aftur eru tilreiðar at seta í verk.

Tað er veruleikin, eftir at norsku sjóvinnumyndugleikarnir hava fingið afturmeldingar upp á herdu krøvini, sum vórðu sett í verk í juni 2018. Herðingar, sum millum annað umfataðu herd krøv til svávulútlát og forboð móti at sleppa spillvatni út.

Danska blaðið Søfart skrivar, at teirra millum, sum vilja herða krøvini uppaftur meira, er norska stjórnin.

– Stjórnin ynskir at minka um útlátið av øllum møguligum inni á norsku firðunum. Strangari krøv fyri skip at sigla í heimsarvafirðunum er eitt stig á rættari leið, heldur norski veðurlags- og umhvørvisráðharrin, Ola Elvestuen, í einum tíðindaskrivi.



*Pumpurnar umborð á Norrønu, sum pumpa sjógv upp í skrubbararnar. Nú ætla norsku myndugleikarnir at seta millum annað stórum reikferðaskipum forboð fyri at nýta skrubbarar inni á norsku firðunum av ótta fyri, at skrubbararnir dálka firðirnar*

## Minni svávulútlát

Norsku sjóvinnumyndugleikarnir skjóta nú upp, at brennievnið, sum brúkt verður inni á norskum firðum, í mesta lagi skal innihalda 0,1 prosent av svávuli. Haraftrat kemur uppskotið at banna nýtsluni av skrubbarum í somu økjum uttan mun til, um talan er um opnar skipanir, afturlatnar skipanir ella um blandingsskipanir.

– Royndirnar vísa, at roykreinsiskipanirnar í dag hava sjónligt roykútlát, og nakrar skipanir koyra útlátið á sjógv. Hóast sjónligi roykurin partvís bara er dampur við vatni, fáa fólk eina neiliga uppliving av tí, sigur Bjørn Pedersen, sum er leiðari í ráðnum fyri lóg- og altjóða sambond í norska Sjóvinnustýrinum, skrivar danska blaðið Søfart.



## *FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kári Hansen | Gøtugjógv | 1/1-1939 | 80 ár |
| Kári Gaard | Tjørnuvík | 25/2-1949 | 70 ár |
| Hans Martin Johannesen | Hoyvík | 4/1-1959 | 60 ár |
| Sólvin Bjarnason Højgård | Rønne | 9/1-1959 | 60 ár |
| Hjørtur Poulsen | Kirkjubøur | 11/1-1959 | 60 ár |
| Torfinn Hansen | Leirvík | 15/2-1959 | 60 ár |
| Frits Strøm | Trongisvágur | 22/2-1969 | 50 ár |
| Símun Marni Skorastein | Hvannasund | 20/12-1978 | 40 ár |
| Dan André Rasmussen | Strendur | 28/12-1978 | 40 ár |
| Jákup Egil Joensen | Froðba | 30/12-1978 | 40 ár |
| Petur Kári B. Funding | Hoyvík | 3/2-1979 | 40 ár |
| Bergur Jacobsen | Klaksvík | 11/12-1988 | 30 ár |





# Frá Maskinmeistarafelagnum

20. september 2018
Fundur í arbeiðsbólkinum at viðgerða og eftirmeta fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum.

26. september 2018
Fundur við umboð fyri Reiðarafelagið fyri farmaskip. Á skrá var støðan við fremmandum sjófólki við FAS skipum.

28. september 2018
Nevndarfundur. Á skrá vóru, umframt kunning, sjey ymisk mál til støðutakan. Teirra millum víðari framferð í sáttmálasamráðingunum við KAF og tryggingarstøðan hjá limum í fiskiflotanum.

1. oktober 2018
Sjeyndi samráðingarfundurin við KAF. Fundurin endaði við, at avgerð varð tikin um at innkalla Semingstovnin.

2. oktober 2018
Fundur at velja fólk í Semingstovnin. Terji Sigurðsson og Símun Absalonsen vórðu afturvaldir.
Fundur við Semingstovnin um KAF-samráðingarnar, sum vóru slitnaðar.

11. oktober 2018
Fundur við KAF. Á skránni var innplasering av maskinmeistara.

15. – 20. oktober 2018
Semingsfundir. Endin varð, at nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður seinnapartin 20. oktober.

26. oktober 2018
Nevndarfundur. Á skrá vóru ymisk mál, eitt nú eftirmeting av gjørdum sáttmálum og komandi sáttmálasamráðingar.

29. – 30. oktober 2018
NMF fundur í Ålesund. Á skránni var millum annað framløga av landarapportum, ein gestarøðari frá ITF, sum hevði eina framløgu um arbeiðið við at broyta ymisk manningarviðurskifti.

1. november 2018
Hátíðarhald teirra sjólátnu á Vinnuháskúlanum, har Føroya biskupur og løgmaður hildu røðu. Aftaná varð farið í Viðarlundina, har kransur varð lagdur við minnisvarðan.

8. november 2018
Kunnandi fundur í P/F Fakfelag, har Jan Jacobsen og Høgni Olsen høvdu framløgur um úrslitið og framtíðar vánir.

9. november 2018
Fundur í arbeiðsbólkinum at viðgera og eftirmeta fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum.

12. november 2018
Fundur við maskinmeistararnar á Vágsverkinum. Til umrøðu vóru í høvuðsheitum nýggi sáttmálin við KAF.

12. november 2018
Fundur á Strandfarðaskipum landsins á Tvøroyri, har ymisk setanarviðurskifti vóru til umrøðu.

13. november 2018
Felagsfundur millum manningarfeløgini og løgfrøðing um Fasta Gerðarættarmálið ímillum feløgini og Føroya Reiðarafelag.

15. november 2018
Sjóvinnutiltak í Kongshøll um framtíðar sjóvinnupolitikkin í Føroyum. Luttakarar vóru politikarar, vinnan, fakfeløgini og ymiskir aðrir aktørar á hesum økinum. Formaðurin í MF hevði eitt av fleiri innleggum, har hann lýsti vinnuna, sæð úr einumfakfelagssjónarhorni.

16. november 2018
Fundur við maskinmeistararnar á Vágsverkinum. Til umrøðu vóru í høvuðsheitum nýggi sáttmálin við KAF.

23. november 2018
Fundur við hini manningarfeløgini um sáttmálasamráðingarleistin vísandi til komandi sáttmálasamráðingar við Reiðarfelagið fyri Handilskip.

29. november 2018
Fundur í arbeiðsbólkinum at viðgera og eftirmeta fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum.

29. november 2018
Vitjan umborð á Tróndi í Gøtu, har møguleiki var hjá maskinmeistarunum at koma við spurningum og íblástri til komandi sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag.

30. november 2018
Fundur við Føroya Reiðarafelag saman við hinum manningarfeløgunum, har komandi sáttmálasamráðingar vórðu umrøddar.

30. november 2018
Fundur í Maretima útbúgvingarráðnum, har millum annað nýggja aspirantskipanin á maskinmeistaraútbúgvingini varð umrødd. Haraftrat vóru onnur viðurskifti, til dømis maskinmeistara-bachelor, og dekkaraútbúgvingar umrødd.

30. november 2018
Nevndarfundur. Á skrá vóru níggju ymisk mál, teirra millum tíðaráseting av komandi aðalfundi og ymiskar stuðulsumsóknir.



# SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

## VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

## TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

SENDISTOVAN